# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 24.11.2025 kl. 17.00

Á fundi: Janus Thomsen
Poul Laust Christiansen
Rakul Mørk
Jóhannes Liasson Rasmussen
Jónfinn L. Poulsen
Thorstein Thomsen (fyri Otto West)

Ikki møtt: Ronni Hammer

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **102-61-2025: Umsókn um byggiloyvi á matr. nr. 524s, Hvalba.**
    a. Umsókn frá MTV Byggivirki, sum vegna Sp/f 01.07.2019 søkir um byggiloyvi til 12 eindir av raðhúsum á matr. nr. 524s, Hvalba.

    **Byggimálsviðgerð**:
    Søkt verður um at byggja nærri enn 2,5 m frá marki. Byggimálsviðgerin mælir til at gera frávik og ganga umsóknini á møti.

    Grundgeving:
    Tá bygging, sum ikki ella bara lutvíst uppfyllir ásetingarnar í byggirættinum, skulu hesir viðgerast eftir heildarmetingini í kap. 2.3.1 – 2.3.5 í Bygningskunngerðini.

    Søkt verður um at byggja 2,28 m frá marki á LS síðu. Her liggur bygningurin upp at kommunalum vegi og er frávikið somikið lítið, einans 22 cm, at mett verður, at hetta ikki hevur neiliga ávirkan á økið.

    Á ÚN-síðu verður søkt um at byggja í mark. Á ÚN-síðu liggur bygningurin upp at haga, har byggisamtyktin ikki loyvir meira bygging. Sostatt verður fráleikin ikki til ampa fyri komandi bygging á hesari síðuni.

    Málið hevur verið til hoyring hjá viðkomandi pørtum, har ongin mótmælir ætlanini.

b. Rammuavtala viðvíkjandi raðhúsabygging á matr. nr. 524s, Hvalba.

Endamálið við avtaluni, er at fastleggja karmarnar fyri samstarvi partanna millum um at fáa til vega bústaðir í Hvalba. Sp/f 01.07.2019 byggir, eigur og leigar út 12 bústaðir vesturi á Heyggi, Hvalba á matr. nr. 524s.

**Tekniska nevnd 27.10.2025 og 23.11.2025:**

Rammuavtalan viðgjørd tann 27.10.2025 – mælt verður til at taka undir við hesum.

Umsóknin um byggiloyvi viðgjørd 23.11.2025 – mælt verður til, at byggiloyvi verður givið.

**Vega- og havnanevnd 27.10.2025 og 24.11.2025:**

Rammuavtalan viðgjørd tann 27.10.2025 – mælt verður til at góðkenna rammuavtaluna.

Umsóknin um byggiloyvi viðgjørd tann 24.11.2025 – einmælt samtykt at mæla til at geva byggiloyvi.

**Fíggjarnevndin 27.10.2025:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at taka undir við rammuavtaluni millum Hvalbiar Kommunu og Sp/f 01.07.2019.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum og byggimálsviðgeranum og geva byggiloyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at byggingin verður framd í samsvari við hjálagda byggiloyvi og treytum annars sambært BK17.

Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum og taka undir við rammuavtaluni viðvíkjandi raðhúsabygging.

2. **102-45-2025: Dagstovnurin Brosið - umsókn um køksfólk.**

Søkt verður um at fáa loyvi at søkja eftir køksfólki 20 tímar/3 dagar um vikuna.

**Trivnaðarnevndin 24.11.2025:**

Nevndin er samd um at mæla til ikki at játta hesum.

**Fíggjarnevndin 24.11.2025:**

Samtykt varð einmælt at mæla til ikki at játta hesum.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum um ikki at játta hesum.

3. **102-67-2025: Fíggjarætlan 2026 – 2. viðgerð.**

Rakstrarútreiðslurnar eru mettar til kr. 36.834.000,00, íroknað útreiðslur til eldrasamstarvið BHS kr. 11.925.000,00.

| | |
|---|---|
| Afturgjald av skuld | kr. 3.000.000,00. |
| Løguútreiðslurnar eru | kr. 2.600.000,00. |

Inntøkurnar eru mettar til kr. 40.925.000,00, harav inntøkan frá eftirlønargjøldum, DIS og FAS er kr. 11.925.000,00, sambært meting frá FMR.

Skattaprosentið verður lækkað við 0,5%, úr 19,95 til 19,45%. Barnafrádrátturin verður óbroyttur kr. 8.000,00.

**Fíggjarnevndin 24.11.2025:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at góðkenna fíggjarætlanina fyri 2026.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

4. **102-69-2025: Eykajáttan 2025 – 1. viðgerð.**
Samlaða umsóknin um eykajáttan 2025 kr. 7.030.000,00. Av hesum er eykajáttan til løgur kr. 4.040.000,00, tá ongar løgur vórðu ásettar á fíggjarætlanini fyri 2025 og eykajáttanin til eldra-samstarvið BHS er kr. 1.200.000,00.
Eykajáttanin er fíggjað við tøkum peningi.
**Fíggjarnevndin 24.11.2025:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka undir við umsóknini um eykajáttan 2025.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.10

Janus Thomsen Poul Laust Christiansen Rakul Mørk

Jóhannes Liasson Rasmussen Thorstein Thomsen Jónfinn L. Poulsen